# Politikkur í verki heldur enn á pappírinum

JOHN JOHANNESSEN
form. Javnaðarfl. á tingi



**Tað var gleðiligt at uppliva stóru undirtøkuna fyri nýggju samgonguni og nýggja samgonguskjalinum, tá øll javnaðarfeløgini kring landið hittust á floksleiðslufundi 24. september at góðkenna samgonguavtaluna. Í Javnaðarflokkinum er breið semja um, at betri er at sleppa at gjøgnumføra politisku málini í eini virkisførari samgongu enn bert at eiga tey á pappírinum**

Tað var rætt at skipa CHE samgonguna í februar í ár. Tað eri eg framvegis sannførdur um. Og eg eri eisini harmur um, at hon slitnaði. Hendan samgongan kundi havt slóðað nýggjar politiskar leiðir. Samgonguskjalið var nýskapandi og fylt við javnaðarpolitikki.

Trupulleikin var bert, at samgongan ongantíð gjørdist veruliga virkisfør. Gyltu politisku málini vóru til staðar á pappírinum og í retorikkinum. Men tað bilti við politiska handalagnum. Álitið millum samgongupartarnar reyk eisini beinanvegin, tá fyrstu avtalurnar longu vórðu brotnar minni enn eina viku inni í samgonguskeiðnum.

Harmiligt var tað, at hóast álit og virkishugur valdaði ímillum flestu samgongulimir, so súrgaðu aðrir partar umhvørvið so nógv, at allur politikkur steðgaði upp.

**Til arbeiðis við ABC**

Nú hava vit fingið nýggja samgongu og nýtt samgonguskjal, sum eisini inniheldur nógv góð javnaðarmál. Tey fylla kanska ikki so nógv í vavi í hesum skjalinum og eru ikki so innvavd í gylt lýsingarorð. Men í Javnaðarflokkinum eru vit tó sannførd um, at veruligur politikkur snýr seg um at fáa framt hugsjónina í verki, heldur enn bert at eiga hana á pappíri og í retorikkinum.

Tað er okkara greiða sannføring, at nýggja ABC samgongan veruliga kann borga fyri virkisføri og støðugum viðurskiftum. Tað er somuleiðis greitt, at nógv góð javnaðarmál eru í avtaluni ímillum teir tríggjar samgonguflokkarnar. Í so máta er grundarlagið undir hesari ABC samgonguni til munandi størri fyrimuns fyri javnaðarveljaran, enn grundarlagið undir gomlu ABC samgonuni frá 2004 var tað.

Størsti fyrimunurin við ABC - og møguliga eisini H – samstarvinum er arbeiðsfriðurin og harvið virkisførið. Vit skulu sjálvsagt rokna við nógvum órógvi frá formanninum í Tjóðveldi. Men kortini eri eg vísur í, at hendan samgongan fer at megna at virka til fyrimuns fyri borgararnar í landinum. Stóru avbjóðingarnar, sum heimsumfatandi fíggjarkreppan hevur við sær, krevja eisini støðug og álítandi viðurskifti á politiska pallinum, um vit sum samfelag ynskja at sleppa nøkulunda snikkaleys undan avbjóðingunum.

**Javnaðarmálini**

Tað var ein ógvuliga beinrakin eygleiðing, tá ein av limunum á javnaðarfundinum 24. september skýrdi nýggja ABC samgonguskjalið at vera eitt javnaðarpolitiskt skjal burturav. Tað taki eg sum eina staðfesting av, at vit eru komin nógv betri burtur úr ABC samráðingunum hesaferð enn í 2004.

Vit hava avtalað, at samhaldsfasti skal styrkjast, so útgjaldið kann hækka munandi. Hetta er ógvuliga avgerandi fyri liviumstøðurnar hjá einum stórum parti av pensjónistunum í landinum. Slíka avtalu bar ikki til at fáa í CHE samstarvinum.

Ríkisveitingin verður nú ikki lækkað í óðum verkum við stórum upphæddum av reinum nationalistiskum ávum, soleiðis at vælferðin kann koma í vanda. Í staðin er avtalað, at ríkisveitingin varisliga verður lækkað samsvarandi inntøkuvøksturin í samfelagnum. Hetta er fult í tráð við tað, ið Javnaðarflokkurin áður hevur skotið upp. Við hesum fara vit undir eina greiða tilgongd móti sjálvberandi búskapi, uttan at vit seta vælferðina til viks og leypa á bláman av nationalistiskum ótolni.

Avtalað er at fjálga um heilsuverkið og seta neyðugu orkuna av, so tað fæst at virka eftir krøvunum í einum nútímans samfelag. Í sama viðfangi sleppur brúkarin eisini undan sjúkrakassagjaldinum og fær harvið ein munandi avgjaldslætta.

Greiðar avtalur eru um at syrkja Barsilsskipanina, at skipa førleikagevandi arbeiðsmarknaðarútbúgvingar, at skipa útbúgvingar fyri serlærarar, at styrkja og menna fólkaskúlan og føroyskt undirvísingartilfar, at leggja til rættis nýggja almannalóggávu, at fremja pensjónsreformin og bústaðaræltanina í verki saman við nógvum øðrum góðum málum, ið eru við til at hjálpa um gerandisdagin hjá einstaka føroyinginum.

Javnaðarflokkurin er fegin um nýggja samstarvið og ásannar, at vit í hesum samstarvinum hava reellan møguleika at fáa framd fleiri av okkara høvuðsmálum í verki, heldur enn bert eiga tey niðurskivað í føgrum vendigum í øðrum samgongusamstarvi.

# Kæra um manglandi lóg

PETUR Í GONG
Brúkarasamtakið



At gera politiskar viðmerkingar nú um dagarnar kann tykjast meira ella minni høpisleyst. Flestu okkara hava fyribils politiskt vaml og hava mesta hugin at stinga høvdið niður í eina spann so skjótt vit hoyra nakað sum helst, ið ber brá av fiskidøgum, uppbrotnum skrivstovum og líknandi.

Men samstundis er hetta ein vandamikil støða fyri okkum at vera komin í. Tí, ikki fyri at leggja nøkrum tað til, so er tað júst nú, ið onkur snildur politiskur telvari kundi forert bæði landsjørð og hvønn einasta stert burtur í ævigar tíðir. Alt meðan vit standa við høvdinum niðri í spannini.

Tí fari eg heldur halda meg til tað harkaliðið, ið eftir førimuni roynir at fylgja við, og loyvi mær at gera nakrar vælmeintar viðmerkingar um nýggja samgonguskjalið. Í hesum føri brúkaramál.

Heilt neyvt sigur samgonguskjalið um brúkaramál, at "Rættindi hjá brúkarum skulu styrkjast við lógardagføringum og nýggjum lógarásetingum." og "Til tess at tryggja rættindi borgaranna verða nýggj keypilóg, lóg um fastognarkeyp og meklaravirksemi samtykt." So er tað sagt. So skuldi ikki verið meira at kravt. Men kortini.

Samgongan hevur sett sær tvey sera týdningarmikil mál fyri. Dagføring av keypilógini og Lóg um fastognarkeyp. Men tað týdningarmesta málið er onkursvegna gloymt burtur, og er ikki sloppið upp í part. Nevnliga Lóg um kærunevnd.

Hóast rættindi okkara sum brúkarar ikki kunnu sammetast við tey í restini av Evropu, eru tey ikki heilt eingi. Men hóast vit t. d. sambært keypilógini hava rætt, er als ikki víst, at vit fáa rætt. Handilsmaðurin ella kvinnan kann bara siga kortanei, og biðja okkum renna og hoppa. Tá hava vit ikki annað til at taka enn at fara so nakkalong til hús. Ella fara til sakførara at biðja hann ella hana um at hjálpa okkum at stevna. Hetta seinna man mangan vera dekan ov ógvusligt, tá talan mangan er um vøru, ið, hóast dýr, kostar líti og einki í mun til ein sakføraratíma.

Við Lóg um kærunevnd høvdu vit brúkarar fingið eitt stað at fara við okkara ónøgd. Eitt stað, ið skjótt og bindandi kundi avgreitt ósemjur millum seljara og keypara.

Tí er Lóg um kærunevnd eftir mínum tykki tann lógin, ið vit fyrst av øllum eiga at fara í holt við. Men tað merkir ikki, at Lóg um fastognarkeyp og dagføring av Keypilógini einans skulu gerast viðfáningar í framtíðar brúkarapolitikkinum. Hesar hava so sanniliga eisini týdning.

Við ynskjum um eitt gott og gevandi samgonguskeið fyri brúkaran.

# Hugleiðingar undan kommunuvalinum

LEIVUR HANSEN
býráðslimur og valevni á Lista E



Kommunupolitikarar kring landið ganga nýggjum og spennandi avbjóðingum á møti.

M.a. er líkt til, at breið semja nú umsíðir er á løgtingi um at skipa landið í færri og størri kommunueindir – einar sjey í tali.

Sambært samgonguskjalinum hjá nýggju landsstýrissamgonguni verður miðað eftir, at hetta skal verða veruleiki í 2011, so ivaleyst fer hetta at skunda undir upp aftur fleiri sjálvbodnar kommunusamanleggingar í næstum.

Ein broyting av kommunala landkortinum í Føroyum er neyðug til tess at vit kunnu fáa eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum landið og kommunurnar. So at málsøki, sum í dag liggja undir landinum, kunnu verða løgd út til kommunurnar at umsita. Eitt nú fólkaskúlin og eldrarøktin.

**Eitt kommunufelag og eina brennistøð**

Fyrsta dagin verður nýtt kommunufelag sett á stovn, sum fer at fevna um allar kommunurnar í landinum. Hetta merkir, at Føroya Kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya fara í søguna.

Kommununala arbeiðsgevarafelagið verður samstundis skipað sum ein deild undir nýggja felagnum.

Hetta má sigast at vera ein røtt og skilagóð avgerð, sum vónandi bæði fer at styrkja samskiftið kommunanna millum og ikki minst mótvegis landsmyndugleikunum o.ø.

Stuttligt hevði verið, um hetta eisini kundi elvt og eggjað komandi kommunupolitikarum til at fingið eitt samstarv í lag um eina nýggja, felags brennistøð fyri alt landið, tá tær báðar verandi brennistøðirnar hava tænt fyri seg um eini 10-15 ár ella so.

Tórshavnar kommuna eigur í hesum sambandi at leggja lendi av til eina tílíka brennistøð nærindis elverkinum hjá SEV á Sundi.

Hetta hevði m.a. havt við sær, at vit kundu økt munandi um fjarhitaorkuna í Suðurstreymi og framleiðsluna hjá SEV av grønari orku.

**Blokkstuðul ongan áhuga**

Nýggja landsstýrissamgongan ætlar eisini at seta eina kommissión m.a. at fyrireika útjavning og blokkstuðul.

Eini útjavning sleppa vit neyvan undan, og persónliga ræðist eg heldur ikki eina tílíka skipan, væl at merkja um hon er bygd á bæði eina sakliga inntøku- og útreiðslujavning.

Harafturímóti havi eg ilt við at góðtaka eina blokkstuðulsskipan sum lið í flytingum av málsøkjum til kommunarnar.

Tað undrar meg eisini, at hetta yvirhøvur er komið aftur á breddan.

Tey, ið gjørdu kommunuálitið frá 1998, mæltu frá at seta eina heildarveitingarskipan í gildi í Føroyum, m.a. tí at hetta ikki gav borgarunum eina nóg greiða mynd av, hvat kommunuvirksemið í roynd og veru kostar.

Heldur enn at fáa blokk frá landinum fyri t.d. læraralønirnar, eigur javningin at fara fram um skattin, so at landsskatturin minkar við tí skattaprosenti, sum læraralønirnar kosta, og kommunuskatturin veksur so samsvarandi við hesum sama skattaprosenti.

Hetta hevur eisini verið leisturin, ið nýttur hevur verið higartil í teimum førum, málsøki eru flutt til kommunurnar at umsita. Hetta hevur riggað væl, og tí fari eg at mæla landsstýrinum til at halda fast við hesa skipanina.